# Maersk Air umhugsar framtíðina

**Leiðslan í danska flogfelagnum Maersk Air vil hvørki vátta ella avsanna tíðindi um, at felagið ætlar at gevast við Føroyaflúgvingini. Endalig støða er ikki tikin, sigur stjórin**

FLOGFERÐSLA
*Edvard Joensen*




*Leiðslan í Maersk Air vil hvørki vátta ella avsanna áhaldandi tíðindi um, at felagið ætlar at gevast við Føroyaflúgvingini*
*Mynd: Edvard Joensen*

Afturvendandi tíðindi frá fólki í ferðavinnu og flogferðslu vilja vera við, at danska flogfelagið Maersk Air ætlar at gevast at flúgva til Føroya. Felagið hevur røkt hesa flúgving í 34 ár.

Leiðslan í Maersk Air vil ikki vátta hesi tíðindi. Men tey verða heldur ikki afturvíst.

– Vit arbeiða alla tíðina við framtíðarætlanum, og tað er eingin endalig støða tikin enn, um vit fara at gera hatta, tú nevnir, ella ikki, sigur stjórin i Maersk Airt, Finn Øelund, umvegis kunningarstjóran í felagnum.

Per Brinch, kunningarstjóri, sigur, at honum er kunnugt, at stjórin, Finn Øelund, hevur tosað við onnur flogfeløg um framtíðarætlaninar hjá Maersk Air. Eitt av hesum feløgum er Atlantic Airways, sigur Per Brinch. Men hann vil ikki siga nágreiniliga, hvat tosað hevur verið um. Bert tað, at eingin endalig støða er tikin.

Tað einasta, hann vil siga um Føroyarutuna er, at Maersk Air hevur havt framgongd í ferðafólkatali síðan í vetur. Tað er ikki einans tí, at fleiri fólk ferðast, sigur hann. Felagið kann vísa á ein størri prosentpart av teimum, sum ferðast, sigur kunningarstjórin hjá Maersk Air.

Magni Arge, stjóri í Atlantsflogi, sigur í stuttari viðmerking, at hann kennir ikki til slíkar ætlanir hjá kappingarneytanum.

– Tað er eingin ynskistøða, um tað hendir. Men verður tað veruleiki, fara vit at spenna okkum so mikið meira út á farleiðini til Danmarkar. Vit hava umstøður til tað í løtuni, nú vit hava trý flogfør, sigur Magni Arge, sum heldur, at tænasta verður ikki verri, um bara eitt felag fer at flúgva millum Føroyar og Danmark.

Tað eydnaðist ikki at fáa viðmerkingar frá øðrum pørtum í ferðavinnuni, áðrenn blaðið fór til prentingar.

# Kanna kubbar í Vágum

**Fólk frá Vágatunlinum stóðu týsmorgunin við gjaldsstøðina í Vágum og kannaðu eftir, um kubbarnir í bilunum, sum fóru gjøgnum tunnilin, vóru í lagi. Fólk sum koyra við ógoldnum kubba, kunnu verða biðin um at lata hann innaftur**

FERÐSLUGJALD
*Edvard Joensen*



*Týsmorgunin vórðu allir bilar, sum koyrdu úr Vágum, kannaðir fyri at vita, um kubbarnir vóru í lagi. Mjólkarbilurin slapp ígjøgnum uttan trupulleikar*
*Mynd: Edvard Joensen*

Vágar: Koyrir tú við ógoldnum kubba, og eftirlit er við Vágatunnilin, kann tað henda, at tú verður biðin um at lata kubban frá tær.

Týsmorgunin vórðu allir bilar, sum koyrdu úr Vágum gjøgnum Vágatunnilin, kannaðir fyri at vita, um teir høvdu galdandi kubbar í bilinum.

Hetta verður gjørt av og á, sigur Reinhold Isaksen á skrivstovuni hjá Vágatunlinum. Slíkt eftirlit er millum annað fyri at vita, um kubbarnir, sum eru í bilinum, eru teir, sum hoyra til hendan bilin og ikki eru flutt-ir úr øðrum bili.

– Vit vilja eisini vita, um kubbin situr á rætta stað og er sjónligur, sum hann skal. Um ikki, kann tað henda, at hann ikki verður skrásettur, tá hann fer gjøgnum gjaldstøðina.

Eisini kemur tað fyri, at onkur koyrir við kubba, sum ikki er goldið fyri. Tað vil so siga einum kubba, sum er útgingin og ikki endurnýggjaður.

## Taka kubbar

Sosialurin frætti týsmorgunin, at fólk frá Vágatunlinum stóð við tunnilsmunnan og tók kubbar úr bilum, har ikki var goldið.

Reinhold Isaksen sigur, at soleiðis er mannagongdin vanliga ikki.

– Tað, vit gjørdu hendan morgunin, var eitt vanligt stakroyndareftirlit, vit gera soleiðis av og á. Vit hava eitt yvirlit yvir bilar, sum ikki hava goldið fyri kubban, teir hava. Og koma slíkir bilar gjøgnum eftirlitið, kunnu vit biða um at fáa kubban frá teimum, um eftirstøðan er so stór, at vit halda tað vera neyðugt at gera so. Og vanliga fáa vit eisini tað, tí fólk vita sjálv, hvussu vorðið er.

Tað kemur fyri, at eftirstøðan er so mikið stór, at vit lata hana fara til inkasso, og tað eru vanliga slíkar kubbar, vit biðja um at fáa aftur. Og tað nyttar í grundini ikki so nógv hjá fólki at nokta. Tí gera tey tað, verður kubbin bara heintaður á annan hátt, sigur hann.

Tað er soleiðis, at kubbin er skrásettur til ein ávísan bil, og hann skal sita á sjónligum stað. Tað vil siga í forrútinum, soleiðis at eftirlitsskipanin við gjaldstøðina ikki skal hava nakran trupulleika av at skráseta hann, tá koyrt verður gjøgnum støðina.

Tað, sum eftirlitið týsmorgunin millum annað skuldi gera, var at vita, um allir kubbarnir stóðu har, teir skuldu og í tí rætta bilinum.

Tað hendir seg, at fólk ikki tíma at festa hann, men leggja hann í ein lumma í hurðini, í handskarúmið ella aðrastaðni, fyri síðan at gloyma hann. Og so kann eisini henda, at hann ikki verður skrásettur, tá koyrt verður ígjøgnum tunnilin.

Men tað kemur bara aftur um aftur, tí fotoeftirlitið sær bilin, og um tú koyrir uttan gjald, kostar tað bót, sum er væl dýrari enn eitt kubbagjald.

## Nógv ferðsla

Tað koyra rættiliga nógvir bilar gjøgnum Vágatunnilin hesa árstíðina, sigur Reinhold Isaksen.

Yvirlitið fyri juni mánað vísir, at knappliga 1.200 bilar koyrdu dagliga gjøgnum tunnilin. Í mei var talið umleið 100 lægri. Og verður tað í ár, sum tað var í fjør, fer juli helst at verða tann mánaðin, har flestir bilar fara gjøgnum Vágatunnilin. Í august fer so at minka aftur, um gongdin skal væntast at verða sum í fjør, sigur hann.

Tað ferðast nógv fólk vestur í Vágar hesa tíðina. Eitt nú eru nógvar summarlegur á Zarepta í Vatnsoyrum, sum nógvir bilar koyra til. Eisini verður Vestanstevna komandi vikuskifti, og tá vænta tey nógva ferðslu gjøgnum tunnilin, sigur Reinhold Isaksen.



# Fara at hyggja eftir tara og gomlum bygdum í Suðuroy

**Hesa vikuna verður skipað fyri øðrvísi tiltøkum í Suðuroy. Seinasta vikuskiftið vóru heili 136 fólk við í teimum tiltøkum, sum kunningarstovurnar í oynni skipaðu fyri**

FERÐAVINNA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Í stórfingnu natúiruni omanfyri Fámjin. 12 ára gamla Sharada, fremst á myndini, var yngsta gongufólki á hesi ferðini*

Tari er ikki bara tari.

Tað fara kunningarstovan á Tvøroyri og í Vági at vísa suðuroyingum og teimum sum ferðast í Suðuroy í annaðkvøld.

Í morgin skipar kunningarstovurnar í Suðuroy fyri forvitnisligum taratúri til Fámjins, har fólk fáa høvi at kunna seg við hesa plantuna niðri við sjóvarmálum, sum er lágt í metum hjá teimum flestu.

Á ferðini er ætlanin er at vassa í mølini og hyggja at tí fjølbroytta tara vøkstrinum. Høvi verður at hoyra um t.d nøvn, útbreiðslu osfr av ymiskum tarasløgum og, hvar hann veksur. Og hetta er í veruleikanum nógv meiri fjølbroytt, enn fólk flest geva sær far um.

Tað vera tey bæði, Agnes Mols Mortensen og Niels M. Jacobsen, sum fara at siga frá á túrinum.

Bussur koyrir av Kunningarstovuni í Vági kl. 17.15 og av Kunningarstovuni á Tvøroyri kl. 17.45. Eftir túrin koyra bussarnir heimaftur

Fólk eiga sjálvsagt at hava gummistivlar við og eiga fólk onkra bók um plantur og djór í fjøruni, ger tað uttan iva túrin meiri áhugaverðan at hava eina slíka bók við.

Hesin túrurin kostar tilsamans 100 krónur fyri vaksin men hjá børnum er hann ókeypis

## Hyggja at gomlum bygdum

Leygardagin verður skipað fyri gongutúri úr Víkarbyrgi til Akrar.

Koyrt verður til Víkarbyrgi og farið verður út um bøgarðin har varðagøtan byrjar. Gingið verður eftir varðagøtuni niðan á Brúnna, sum er 249 metrar og síðani oman eftir Akravegnum, framvið Ærgisá og oman á Akrar.

Túrurin tekur umleið ein tíma og hann er ikki tungur at ganga. Á hesum túrinum verður tað Gudmund Poulsen úr Sumba, sum sigur frá.

Til hendan túrin koyrir bussur av Kunningarstovuni á Tvøroyri kl. 10.00 og av Kunningarstovuni í Vági kl. 10.30.

Aftaná túrin koyra bussarnir fólk heim aftur á kunningarstovurnar.

Kostnaður fyri gongutúrin og busskoyring er 100 krónur fyri hvønn, men tað er framvegis ókeypis fyri børn.

Fólk kunnu melda seg til túrarnar á kunningarstovuni í Vági og á kunningarstovuni á Tvøroyri. Síðsta freist at melda til taratúrin er hósdagin kl. 16.00 og til gongutúrin skal meldast til fríggjadagin klokkan 16.

Kunningarstovurnar siga eisini, at tey, sum eru við á øllum gonguferðunum eru við í lutakassti um eitt gávukort upp á 2000 krónur.

## 136 fólk

Seinasta vikuskiftið skipaði ferðavinnan í Suðuroy fyri fleiri tiltøkum, og har vóru tilsamans ikki færri enn 135 fólk við, so tað má sigast at verða væleydnað, har vóru bæði børn og vaksin og har vóru eisini fleiri útlendsk ferðafólk.

Seinasta vikuskiftið gingu tey úr Trongisvági til Fámjins, tey vóru í fjørðinum við gomlu sluppini, Johonnu og tey vóru í Akrabergi og hugdi at fugli.



*Tann fimm ára gamli Fríði Stenberg Olsen stendur so hugagóður og kikar eftir fugli í Akrabergi. Elsta fólkið á túrinum var væl yvirt tey áttati*




**“KOM SUÐOR — TAÐ ER NOGV NOGV LETTARE”**

Kunningarstovan í Vági tel 374342 / 284342, Kunningarstovan á Tvøroyri tel 372480 / 284480,
Frítíðarhúsini í Lopra tel 374342, Hotel Bakkin tel 373961, Hotel Øravík tel 371302,
Hotel Tvøroyri tel 371171, Gistingarhúsið undir Heygnum tel 372046